LM-017/2025

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

FØROYA ARBEIÐSGEVARAFELAG

Fíggjarnevnd Løgtingsins

Tórshavn 4. november 2025
Okkara tilv./Our ref.:
4989-4075/Niels/Fxroya-FAG-B-H
Tykkara tilv./Your ref.:

Hoyringssvar til uppskot um broyting í MVG-lógini

Av tí at uppskotið um broytingar í MVG-lógini (LM-019/2025) ikki varð sent til ummælis áðrenn tað varð lagt fram, sendir Føroya Arbeiðsgevarafelag sínar viðmerkingar beinleiðis til Fíggjarnevndina.

Uppskotið snýr seg í stuttum um at frítaka epli, grønmeti og blæur v.m. fyri meirvirðisgjald.

Endamálið við uppskotinum er sambært viðmerkingunum at lætta um gerandisdagin hjá fólki. Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur tó, at tað eru aðrir og minni umsitingartungir hættir at lætta um hjá fólki. Eitt nú kann væntast at tað fer at føra til nakað av eyka umsiting, serliga hjá teimum lítlu handlunum.

Harumframt fáa eitt nú sunnar, stuttfluttar føroyskar fiskavørur, ikki fáa sama fyrimun í avgjaldslóggávuni, sum ætlanin er at geva grønmeti v.m.

Um samgongan ætlar at lætta um gerandisdagin hjá føroyingum, mælir Føroya Arbeiðsgevarafelag til, at sjóneykan serliga verður sett á føroyskar barnafamiljurnar. Tað eru ofta tær, sum hava tað tungt fíggjarliga, og burðartalið í Føroyum er seinnu árini minkað nógv. Heldur enn at frítaka ávísar vørur fyri MVG, kundi allur peningurin verður nýttur til at hækka barnafrádráttin í landsskattinum uppaftur meira, enn ætlanin er í broytingaruppskotinum til Ásetingarlógina (LM 017/2025).

Eisini skal verða víst á, at Bilasølufelagið alment hevur gjørt vart við, at fíggingin av MVG-lækkingini (MVG á leigubilum) ikki fer at geva væntaðu eyka inntøkurnar.

Føroya Arbeiðsgevarafelag
Niels Winther, stjóri

Vinnuhúsið • Boks 1038 • Óðinshædd 7 • FO-110 Tórshavn Tlf. +298 30 99 00 • Fax +298 30 99 01 • E-mail: industry@industry.fo